Nr. 182 - 24. september 2002 Sosialurin 

# Móttøka í Klaksvíkar Klubba



Jákup og Hergerð Ziskason borðreiddu við pinnamati og drykkjuvørum

**Leygardagin var móttøka í Klaksvíkar Klubba í sambandi við, at hann lat uppaftur eftir at hava verið stongdur í tveir mánaðir. Um fimti fólk høvdu leitað sær inn í klubban henda góðveðursdag, og Sosialurin nýtti eisini høvi til at fáa eitt prát við formannin, Sonhard Johannesen**

MÓTTØKA
*Solby A. Eliasen*

Móttøkan byrjaði klokkan 17, og lagið var gott á øllum, sum løgdu leiðina framvið. Fleiri vóru komin beinleiðis av fótbóltsvøllinum, har fyrsta kvinnulið hjá KÍ júst hevði fingið steyp og heiðursmerki handað, nú fótbóltskappingin er komin at enda hjá kvinnunum.

Øll tosaðu um, hvussu hugnalig og avbera flott hølini í Klubbanum eru vorðin.

Mitt á gólvinum stóð eitt borð við pinnamati, víni, øli og sodavatni, sum Jákup og Hergerð Ziskason borðreiddu við.

Formaðurin helt røðu, har hann millum annað segði seg vóna, at fólk fara at taka væl ímóti klubbanum og fara at vera góð við hann, nú hann er vorðin so flottur. Eisini tosaði hann um arbeiðið at gera klubban í stand. Hann segði, at klubbin er eitt gamalt hús, og tí var tað sera trupult at fáa arbeiðið liðugt.

- Tí eitt gamalt hús verður ein ongantíð liðugur við at seta í stand, segði Sonhard Johannesen. Hann hevur verið formaður í Klaksvíkar Klubba í mong ár nú, og hann segði, at hetta var triðju ferð, at tað bleiv bygt um í Klubbanum, meðan hann hevur verið har.

Teir vælumtóktu vísumenninir syrgdu fyri tónleikinum undir móttøkuni, og sigast má, at teir settu ein írskan dám yvir móttøkuna.

## Klubbalimur – fyrimunur

Í sambandi við móttøkuna, fekk Sosialurin eitt prát við Sonhard Johannesen um týdningin av klubbanum í dag og um billiard.

Sonhard sigur, tað koma framvegis umsóknir inn um at gerast limur í Klaksvíkar Klubba. Og tí meta teir, at tað er grundarlag fyri at halda fram.

- Vit hava ofta tosað um at niðurleggja limaskapin og so bara hava opið alment, men tað er líkasum ikki meiriluti fyri tí kortini millum limirnar, sigur Sonhard.

Sonhard heldur, at tað møguliga er meira virði í hesum, tá ein kann vera limur í einum felagsskapi. Ein limur í Klaksvíkar Klubba fær lykil til húsið og hevur sostatt altíð atgongd. Hann kann eisini bjóða einum persóni við inn. Hinvegin, kann hann eisini biðja ein gest fara útaftur. Men um ein gestur sýnir óhøviskan atburð, so gongur tað útyvir limin, sum hevur boðið honum inn, tí tað verður hann, sum fær karantenu og ikki gesturin.

Hvør fær karantenu og ikki, og hvussu longi, avger nevndin í Klaksvíkar Klubba.

Sonhard sigur, at tað vóru nógv fleiri karantenur fyrr enn nú, so tað má fatast sum, at fólk eru farin at skikka sær betur nú og kanska eru vorðin betri við klubban.

## Billiard vánaliga framtíð

Sonhard Johannesen hevur verið ein av teimum drúgvu billiardspælarunum. Og billiardið hevur sanniliga fingið ferð á nú. Í fjør vunnu teir tríggir Christian Suni Høgnesen, Ólavur Kjølbro og Sonhard Johannesen alt, sum var at vinna í billiardinum. Tað vil siga, lið- einstaklinga- og Haldor Holm kappingina.

Men Sonhard letur illa at framtíðini hjá billiardinum.

- Tað manglar ein billiardlærari ella venjari. Tí tað er ongin tilgongd, so tað verður torført at halda lív í tí.

Einaferð í nítiárunum var eitt billiardfelag í Klaksvík. Sonhard var venjari í tvey ár, men hann sigur, at tað bar illa til fáa tað at ganga. So limirnir í billiardfelagnum fingu sera góðar sømdir frá klubbanum.

Sonhard greiðir frá, at klubbin legði høli til og royndir billiardspælarar gingu har og løgdu teimum ungu lag á.

- Tað gekk væl, og tað vóru fleiri av evnaríkum spælarum, men felagnum var ikki lívi lagað, so tað datt niðurfyri. Og tað eru vit sera harmir um, tí tað kundi havt verið byrjanin til okkurt, sum líktist einum ungdómsarbeiði innan billiard.

Tí er Sonhard sannførdur um, at ein billiardlærari ella venjari hevði gjørt munin.

- Billiard er ikki bert hepni, men sjálvandi skal tað eisini til, sigur Sonhard og vísir á, at nógv venjing altíð er góð og vísir seg at geva í tí longra endanum.

- Hygg bara eftir billiardinum, fyrr vóru tað Mimir og Havnar Klubbi, sum vóru tey stóru nøvnini, síðani kom Tvøroyrar Klubbi, sum ketta upp úr høvdatrog og sum rosinan í pylsuendanum kom so Klaksvíkar Klubbi og setti alt upp á pláss innan føroyska billiardheimin, sigur Sonhard og flennir í kíki.

Umframt hinar báðar, sum hann var saman við til at vinna føroyameistaraheitið í fjør, so nevnir hann eisini Niklas Hera Jákupsson.

- Vit fýra hava vant 25 tímar um døgnið. Og tað vísir seg at geva úrslit nú. Og tað er stak hugaligt, tí nú hava fólk í Klaksvík fingið áhuga fyri billiardinum. Tað kemur ofta fyri, at fólk steðga mær á gøtuni fyri at tosa um billiard – tað kom ikki fyri fyrr, sigur Sonhard Johannesen, sum heldur, at um ungdómsarbeiðið hevði verið miðvísari, so kundi tað eydnast at fingið fleiri yngri at fáa áhuga fyri billardspælinum.



Jan Gardar er settur sum dagligur leiðari í Klaksvíkar Klubba. Hann skal millum annað skipa fyri, at tiltøk verða av ymsum slag



Sonhard Johannesen, formaður í Klaksvíkar Klubba er sera vælnøgdur við umbyggingina av klubbanum

# Lítil og eingin tunfiskur fingin í føroyskum sjógvi

**Japansku skipini, sum hava royndarloyvi í føroyskum sjógvi, hava eisini roynt í altjóða sjógvi – í ein útnyrðing úr Hattonbanka, og har hevur nakað verið at fingið. – Vit hava skilt, at fiskiskapurin er lønandi, tá ið skipini fáa einar 4-5 fiskar um dagin, sigur Eli Christiansen á Fiskirannsóknarstovuni**



*Koei Maru 108 á Havnini við sjúkum manni. »Fishing master« umborð hevði tørv á læknahjálp. Higartil í heyst er lítið og eingin tunfiskur fingin í føroyskum sjógvi*

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Enn er at kalla eingin tunfiskur fingin í føroyskum sjógvi higartil í heyst.

Í vikuskiftinum kom eitt av japansku skipunum, Koei Maru 108, á Havnina við sjúkum manni. Tað var »fishing master« – ella tann reelli skiparin umborð, sum var vorðin sjúkur og hevði tørv á læknahjálp.

Eli Christiansen á Fiskirannsóknarstovuni sigur, at fýra japansk skip gera royndir í føroyskum sjógvi í heyst, og fyrsta skipið byrjaði fiskiskap, 30. august. Annars plaga japansku skipini at koma hendanvegin um mánaðarskiftið, august/september.

Skipini royna tó ikki bara í føroyskum sjógvi, men eisini í altjóða sjógvi vestanfyri.

– Vit hava ein eygleiðara umborð á hvørjum skipi, og tí verður stovnurin í hvørjum einstøkum føri kunnaður, tá ið tunfiskaskipini fara út um fiskimarkið og út í altjóða sjógv at royna.

## Eingi tons at tosa um

Sum skilst, hava japansku tunfiskaskipini, sum hava royndarloyvi undir Føroyum, bert fingið nakrar fáar tunfiskar í føroyskum sjógvi. Enn eru tí eingi tons at tosa um. Fyrstu vikuna fingu tey ongan fisk í okkara sjógvi, men síðan hevur onkur einstakur fiskur hingið á teirri velduga longu línuni, sum skipini seta. Skipini hava tí eisini roynt í altjóða sjógvi – í ein útnyrðing úr Hattonbanka. Har hevur nakað verið at fingið, og okkurt av skipunum hevur ligið millum ein og seks tunfiskar á hvørji setu.

– Vit hava skilt, at veiðan er lønandi, tá ið skipini fáa einar 4-5 fiskar um dagin, sigur Eli Christiansen.

Hann vísir á, at veðrið og hitalagið í sjónum hava stóra ávirkan á, hvussu tunfiskurin ferðast.

Royndarloyvið hjá japansku skipunum í føroyskum sjógvi fevnir um eitt ár í senn; tískil kunnu tey sambært loyvinum royna til ársenda.

– Men skipini plaga ikki at royna longur enn út í hálvan oktober, tá ið sesongin vanliga er av, sigur Eli.

Umborð á japansku tunfiskaskipunum liggur manningartalið um 23, okkurt skip hevur tó havt einar 26-27 mans umborð.

## Fingu mest fyrsta árið

Síðan 1997 hava japansk skip havt royndarloyvi til tunfiskaveiði í føroyskum sjógvi, og árini síðan – undantikið í ár 2000 – hava eini 3-4 skip roynt eftir tunfiski. Í 2000 var bara eitt skip í føroyskum sjógvi.

Umframt at hava eygleiðarar umborð, hava føroyskir línumenn eisini havt høvi at verið umborð á japansku skipunum og fylgt fiskiskapinum, men líkt er ikki til, at áhugin fyri hesum er so stórur longur.

Hagtølini fyri tunfiskaveiði í føroyskum sjógvi eru hesi:
1997 (228 tons, 3 skip),
1998 (174 tons, 3 skip),
1999 (108 tons, 3 skip),
2000 (8,4 tons, 1 skip) og
2001 (65 tons, 4 skip).

Tað er felagsskapurin, ICCAT, sum umsitur alla tunfiskaveiði og tað, sum verður veitt undir Føroyum, verður eisini talt uppí samlaðu kvotuna.

Í Japan er tunfiskur høgt í metum, og japanesarar geva góðan prís fyri hendan fiskin.

# Virkisleiðarar ákærdir sum brotsmenn

**– Tað er eingin meining í at leggja eina heila vinnu undir illgruna, tí Arbeiðseftirlitið nú fer at røkja ein part av sínum arbeiðsøki, heldur Vinnuhúsið**

KJAK UM TRYGD
*Vilmund Jacobsen*



*Vinnuhúsið heldur, at tíðindaskrivið hjá Arbeiðseftirlitinum um persónliga trygd á fiskavirkjum, var so negativt, at allir virkisleiðarar á fiskavirkjunum kring landið mundu føla seg um ákærdar brotsmenn yvirfyri almenninginum*

Í tíðindaskrivi fyrr í hesum mánaðinum, gjørdi Arbeiðseftirlitið vart við, at stovnurin fer undir at kanna persónligu trygdina á øllum fiskavirkjum í Føroyum. Í skrivinum legði stovnurin dent á, hvørji møgulig lógarbrot kunnu fara fram á hesum øki, og hvør revsingin er. Arbeiðseftirlitið helt, at farið verður heldur tilvildarliga um persónligu trygdina á nógvum fiskavirkjum, og at enda hótti stovnurin við fúta og rætti.

Úttalilsini hjá Arbeiðseftirlitinum hava fingið ilt í Vinnuhúsið, sum á heimasíðuni nú ger sínar viðmerkingar.

– Sjálvandi er tað rætt, at Arbeiðseftirlitið ger sítt arbeiði og kannar hesi viðurskifti á virkjunum. Tað hevur eingin nakað ímóti. Er okkurt ikki í lagi, eigur tað sjálvandi at átalast og viðgerast sum lóg og reglur fyriskriva.

Vinnuhúsið heldur tað tó vera hugstoytt, at ein almennur stovnur, longu áðrenn kanningarnar eru gjørdar, illgitir um, hvussu farið verður um persónligu trygdina sum heild á virkjunum – og hóttir við fúta og dómara.

– Tað er galdandi fyri okkum øll í øllum viðurskiftum (eisini fyri Arbeiðseftirlitið), at halda vit ikki lógina, fáa vit fúta og dómara uppá nakkan. Einki nýtt er í tí. Tað mátti tí verið óneyðugt við slíkum hóttanum – at leggja eina heila vinnu undir illgruna, tí Arbeiðseftirlitið nú fer at røkja ein part av sínum arbeiðsøki.

Vinnuhúsið heldur, at nevnda tíðindaskriv sum heild var so negativt, at allir virkisleiðarar á fiskavirkjunum kring landið yvirfyri almenninginum mundu føla seg um ákærdar brotsmenn.

– Tað eru nógv fiskavirkir og virkisleiðarar, sum hava gjørt eitt stórt og positivt arbeiði seinastu árini fyri at betra um persónligu trygdina á virkjunum. Tað kann væl verða, at okkurt virkið krevur ábøtur, men fiskavirkini eru sum heild avgjørt ikki verri fyri á hesum øki enn so nógv onnur virkir í Føroyum.

Vinnuhúsið ásannar kortini, at trygdin á virkjunum altíð kann betrast og vísir á, at framhaldandi verður arbeitt við hesum, nevniliga at bøta um persónligu trygdina.

– Vit mugu bara vóna, at eisini Arbeiðseftirlitið í framtíðini verður hepnari til tess at motivera virkisleiðslur, sum longu hava gjørt stór framstig á hesum øki – fyri áhaldandi at arbeiða fram móti hesum felags máli, sigur Vinnuhúsið.